# ku vegunum

*Her sást ein røð av húsbilum, eitt enn størri tal av campingvognum og eitt gott úrval av rullandi summarhúsum. Tað er bert prísurin sum ger av, hvat av hesum tilboðunum tú ætlar tær*

*Bilarnir eru útgjørdir við sjónvarpsantennu, flatskermi og einum dvd-spælara. Tí er einfalt at stytta sær stundir við hesum, um ein hevur hug til tað og ein gerst troyttur at trøunum, sum súsa framvið vindeyganum*







*Ein húsbilur er ein óførur máti at ferðast saman uppá hjá eini familju. Stuttligt er at møta øðrum, sum ferðast undir somu góðu korum. Campingplássini í Noregi eru væl útgjørd at taka ímóti hesum vognunum og børnini hava eisini sítt at fara til*

at hyggja eftir filmi um dagin, er lætt at myrkaleggja rúmið, soleiðis at tað gerst bølaniða innanbils.

Uttanfyri eru markisur í teirri síðuni, har útgongdin er. Hjá útleigaranum ber til at leiga borð og stólar og skaffigreiðir, og tí er einfalt at njóta máltíðirnar uttandura - eisini tá tað regnar.

Nevnast kann eisini, at súkklustativ fylgja við, og tí ber væl til at fara túrar við súkklu burtur frá bilinum, um hugur er til tað.

### Ræðast ikki regnið

Nú er alt pappírsarbeiðið fingið í rættlag. Væl nøgdur og spentur kemur maðurin handan róðrið aftur við loyvinum at koyra við hesum bilinum tær næstu tvær vikurnar.

Í dag er týsdagur og klokkan er farin av 2. Nú skulu vit bert hugna okkum í tvær vikur, áðrenn bilurin skal latast inn aftur

So er bert eftir at leggja leiðina út í vøkru norsku náttúruna. Men hvat - nú er svongdin farin at gera um seg.

Lukkutíð fyri tey ferðandi, liggur ein stóru mathandil fáar hundrað metrar frá leigustaðnum. Her ber til at keypa inn og fylla sær køliskápið við mati.

Her á parkeringsøkinum við matvøruhandilin kemur matur og heitt drekka á borðið eftir lítlari løtu.

Uttanfyri hómast nakrir dropar. Men hvat ger tað - summarfrítíðin við húsbilinum er byrjað.

So kann regn vera regn!